# Miðnámsrit

9 mars 2016

## Um blaðið

Góði lesari!

Í níggjunda Miðnámsriti  eru seks greinir. Finn Jensen gjørdi í 2014 eina kanning fyri Føroya Handilsskúla fyri at vita, hvat føroyskir næmingar á triðja ári á gymnasialum miðnámi ætlaðu sær eftir miðnám. Finn hevur eina grein um hesa kanning.

Tórður Johannnesarson hevur skrivað um eina fleirfakliga undirvísingargongd á handilsskúlanum, har næmingarnir skuldu læra um búskap ígjøgnum orðatøk.

Sámal Matras Kristiansen hevur eina grein um undirvísingartilfar í internetøldini. Hon viðger hóttanir og avbjóðingar við Internetinum í einum námsfrøðiligum samanhangi.

Olav Absalonsen hevur skrivað um, hví børn í Eystur-Asia duga betur at rokna enn børn í Vesturheiminum. Ein orsøk er helst at finna í talorðunum. Men eru aðrar orsøkir eisini?

Úr søguni um búskaparliga hugsan hevur Olav hesa ferð eina grein um Johann Heinrich von Thünen (1783-1850), sum var slóðbrótari innan ástøði um staðseting, um framleiðslu og innkomubýti og at nýta støddfrøði í búskaparfrøði.

Í mars var viðtal við Jonhard Mikkelsen í *Góðan morgun Føroyar* um nýggju appirnar hjá Sprotanum og um teldutøku orðabøkurnar. Sprotin hevur ómetaliga stóran týdning fyri mál okkara. Vit hava skrivað partar av viðtalinum av.

Blaðstjórn: Olav Absalonsen og Tórður Johannesarson

# Innihaldsyvirlit

**Tey ungu vilja lesa læknafrøði ella búskap, Finn Jensen** **3**

**At læra búskap ígjøgnum orðatøk – fleirfaklig læring, Tórður Johannesarson** **9**

**Undirvísingartilfar á veg inn í eina Internetøld, Sámal Matras Kristiansen** **13**

**Hví duga børn í Eystur-Asia betur at rokna enn børn í Vesturlondum? Olav Absalonsen** **19**

**Johann Heinrich von Thünen – og avbyrgdi staturin, Olav Absalonsen** **23**

**Brot úr viðtali við Jonhard Mikkelsen í *Góðan morgun Føroyar*, Tórður Johannesarson** **27**

# Tey ungu vilja lesa læknafrøði ella búskap

Finn Jensen

**Hetta er í stuttum tað, ein kanning vísir, sum Føroya Handilsskúli (nú partur av Glasi) gjørdi á heysti í 2014. Føroya Handilsskúli hevur seinastu árini havt eitt avmarkað útboð av framhaldsútbúgvingum, eitt nú HD, ymsar linjur av Akademiútbúgvingum og Diplomútbúgving innan leiðslu. Tá undirtøkan minkaði til Teldustøðingaútbúgvingina, sum var einasta fulltíðar framhalds-útbúgving á Føroya Handilsskúla, vildi skúlin vita, hvørjar útbúgvingar føroyski ungdómurin ynskti at fara í gongd við.**

Tí gjørdi skúlin eina umfatandi kanning í øllum gymnasialum miðnámsskúlum í landinum. Tað var millum annað úrslitið av hesari kanning, sum gjørdi, at handilsskúlin á heysti 2015 beyð útbúgvingina Marknaðarførslubúskap út. Heili 50 fólk søktu inn á útbúgvingina, og hetta var beinleiðis í tráð við kanningina, so sigast kann, at hon í ein ávísan mun stóð sína roynd. Niðanfyri verður kanningin greinað.

## Spurnakanning á miðnámsskúlum í 2014

Kanningin bleiv gjørd í viku 45 til viku 48 í 2014 á tann hátt, at farið var inn í allar gymnasialar miðnámsskúlar í Føroyum, har allir næmingar á seinasta skúlaári skuldu svara spurnablaði. Kanningin varð gjørd á tann hátt, at umboð fyri kanningina vóru inni í hvørjum einstøkum flokki á øllum skúlunum og tryggjaðu, at allir næmingar, sum vóru møttir, svaraðu kanningini, og at ongin svaraði meir enn einaferð.

Næmingarnir fingu allir at vita, at teir skuldu svara øllum spurningunum eftir bestu sannføring og svara sum einstaklingar uttan at ávirka hvønn annan. Úrslitið gjørdist, at 503 næmingar av 592 fingu høvi at luttaka í kanningini, sum svarar til 85%. Av teimum gluppu 8 næmingar, soleiðis at endaliga talið bleiv 495 næmingar, sum svaraðu, og hetta svarar til 83,6% av næmingunum. Hetta sæst á talvuni niðanfyri.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Spurd tilsamans | 503 | av | 592 | 85,0% |
| Svarað tilsamans | 495 | av | 592 | 83,6% |
| Manglar | 8 | av | 592 | 1,4% |

Viðmerkjast skal, at tað er ongin orsøk at halda, at tey sum ikki svaraðu, høvdu aðra fatan av kanningini, enn tey sum svaraðu. Heldur ikki er nøkur orsøk at halda, at tey høvdu svarað annarleiðis enn tey, sum svaraðu. Saman við tí, at so nógv hava svarað, ganga vit út frá, at kanningin er umboðandi og gevur eina rætta støðumynd.

Niðanfyri verða mest áhugaverdu úrslitini tikin fram, eins og roynt verður at lýsa onkur sambond millum svarini.

## Brot úr kanningini, einsæris úrslit

*Spurningur: Hvussu langa útbúgving ætlar tú tær at taka?*

| | | |
|---|---|---|
| Lærlingaútbúgving innan skrivstovu/handil | 13 | 2,6% |
| Aðra lærlingaútbúgving | 31 | 6,3% |
| Stutta útbúgving (2 ár) | 15 | 3,0% |
| Miðal-langa útbúgving (bachelor e.l. 3-4 ár) | 202 | 40,8% |
| Langa útbúgving (master/kandidat minst 5 ár) | 194 | 39,2% |
| Fulla granskingarútbúgving (phd minst 8 ár) | 22 | 4,4% |
| Onga útbúgving fyribils (næstu 3-4 árini) | 18 | 3,6% |
| Tilsamans | 495 | 100,0% |




*Spurningur: Hevur tú tikið støðu til, hvørja útbúgving tú ætlar tær at taka?*

| | |
|---|---|
| Ja | 209 |
| Nei | 286 |
| Tilsamans | 495 |



*Spurningur: Innan hvat øki ætlar tú tær at útbúgva teg?*

| | | |
|---|---|---|
| Búskap | 62 | 12,5% |
| Gudfrøði | 3 | 0,6% |
| Humaniora/mál | 17 | 3,4% |
| Læknavísindi | 72 | 14,5% |
| Løgfrøði | 24 | 4,8% |
| Námsfrøði | 25 | 5,1% |
| Náttúruvísindi | 43 | 8,7% |
| Sálarfrøði | 29 | 5,9% |
| Samfelagsvísindi | 18 | 3,6% |
| Sjóvinnu | 8 | 1,6% |
| Teldufrøði | 12 | 2,4% |
| Okkurt annað | 182 | 36,8% |
| Tilsamans | 495 | 100,0% |




Kanningin vísti, at meiri enn helmingurin av næmingum á seinasta ári á gymnasialum miðnámi hevði ikki tikið støðu til júst, hvat tey ætlaðu sær. Men millum tey, sum hava tikið støðu, er læknavísindi fremst, og síðan er tað búskapur. Tað er at undrast á, at sera fá ætlaðu sær í gongd við teldufrøði, og nærum ongin áhugi er í okkara høvuðsvinnu, sjóvinnuni, millum hesar næmingar. Sambært kanningini vilja tey ungu á gymnasialum miðnámi taka eina miðal-langa ella heilt langa útbúgving.

Tað er ilt at siga, hví gymnasialir miðnámsskúlanæmingar í Føroyum ikki velja sjóvinnuna, men hugsast kann, at tað er ávís fjarstøða millum sjólívið í Føroyum og gerandisdagin á gymnasialum miðnámsskúlum. At tey ungu í so lítlan mun velja teldufrøði, kann vera, tí man politiskt hevur valt at útveita ein part av hesum til útlendskar fyritøkur.

*Spurningur: Hvar hevði tú helst vilja tikið útbúgving?*

| | | |
|---|---|---|
| Í Føroyum | 145 | 29,3% |
| Í Danmark | 217 | 43,8% |
| Í øðrum Norðurlandi | 23 | 4,6% |
| Í Stóra Bretlandi | 51 | 10,3% |
| Í øðrum landi í Evropa | 30 | 6,1% |
| Uttan fyri Evropa | 29 | 5,9% |
| Tilsamans | 495 | 100,0% |



*Spurningur: Um tú fert undir útbúgving, og útbúgvingin* ***kann*** *takast í Føroyum, velur tú so:*

| | | |
|---|---|---|
| Í Føroyum | 115 | 23,2% |
| Ivist, men helst í Føroyum | 90 | 18,2% |
| Ivist, men helst uttanlands | 116 | 23,4% |
| Uttanlands | 159 | 32,1% |
| Tað er líkamikið | 15 | 3,0% |
| Tilsamans | 495 | 100,0% |




*Spurningur: Um tú fert undir útbúgving, og útbúgvingin* ***ikki*** *kann takast í Føroyum, velur tú so:*

| | | |
|---|---|---|
| Í Føroyum | 25 | 5,1% |
| Ivist, men helst í Føroyum | 31 | 6,3% |
| Ivist, men helst uttanlands | 31 | 6,3% |
| Uttanlands | 402 | 81,2% |
| Tað er mær líkamikið | 4 | 0,8% |
| Fari neyvan at lesa víðari | 2 | 0,4% |
| Tilsamans | 495 | 100,0% |




*Spurningur: Hvar ynskir tú at búgva eftir lokna útbúgving:*

| | | |
|---|---|---|
| Í Føroyum | 402 | 81,2% |
| Uttanlands | 93 | 18,8% |
| Tilsamans | 495 | 100,0% |




## Sambond millum ymisk svar (korrelatiónir)

*Samband: Útvaldar útbúgvingar í mun til útbúgvingarstað.*

| | Um útbúgvingin **kann** takast í Føroyum, velur tú so at taka útbúgvingina | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Í Føroyum | Helst í Føroyum | Helst uttanlands | Uttanlands | Líkamikið | Tilsamans |
| Búskapur | 16 | 10 | 13 | 21 | 2 | 62 |
| Samfelagsvísindi | 2 | 1 | 8 | 7 | | 18 |
| Okkurt annað | 43 | 29 | 41 | 64 | 5 | 182 |




| | Um útbúgvingin **ikki** kann takast í Føroyum, velur tú so at taka útbúgvingina | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | |
| | Í Føroyum | Helst í Føroyum | Helst uttanlands | Uttanlands | Líkamikið | Tilsamans |
| Búskapur | 4 | 4 | 7 | 47 | | 62 |
| Samfelagsvísindi | 1 | 1 | | 16 | | 18 |
| Okkurt annað | 10 | 9 | 10 | 150 | 1 | 180 |



Tað, sum tó stendur eftir sum nakað jaligt, er, at vit veruliga hava møguleika at gera nakað við sonevnda “brain drain” trupulleikan, men tað gerst bara við at stovna viðkomandi útbúgvingar her á landi.

Danmark er framvegis best umtókta landið at lesa í hjá teimum ungu, men rættiliga nógv ynskja at lesa í Føroyum, um bara útbúgvingin, tey ynskja at taka, er í Føroyum. Tað er líkt til, at tey ungu fyrst velja sær útbúgving og síðan útbúgvingarstað. Hetta merkir so, at vit einans kunnu fáa ung at støðast her á landi, um vit hava tað rætta útboðið av útbúgvingum.

Kanningin vísti, at um vit stovna eina útbúgving innan búskap, vilja millum 16 og 26 av 62 spurdum velja at útbúgva seg í Føroyum. Um vit ikki stovna útbúgving innan búskap, kunnu vit rokna við, at einans millum 4 og 8 av teimum 62 verða verandi í Føroyum.

Hetta er bert galdandi fyri tey, sum ætla at lesa búskap. Helst leggjast fleiri av teimum afturat, sum velja samfelagsvísindi ella okkurt annað. Sostatt eru nóg nógv lesandi til at stovna ein flokk, um vit bert taka tey við, sum gingu seinasta árið á gymnasialum miðnámsskúla skúlaárið 14-15, t.e. tey 495 lesandi, sum eru spurd.

Í bakspeglinum sæst, at hesin spádómur gekk út, tá ið 50 søktu inn á útbúgvingina Marknaðarførslubúskap hjá Føroya Handilsskúla í 2015. Spennandi verður at síggja, hvussu nógv søkja inn á næstu útbúgvingina sum verður boðin út á sumri 2016. Nýggja útbúgvingin fer eftir ætlan at eita Fíggjarbúskapur (finansøkonom).

# At læra búskap gjøgnum orðatøk – fleirfaklig læring

Tórður Johannesarson

**Í eina viku frá 11. februar til 15. februar 2013 høvdu 2. árs næmingar í 3-ára HH eina fleirfakliga arbeiðsgongd, ið hevði sum endamál at læra um búskap gjøgnum orðatøk. Hugskotið var úr Onglandi.**

Hesar lærugreinir vóru við: sølubúskapur, virkisbúskapur, altjóða búskapur, føroyskt, danskt, eingilskt, spanskt og støddfrøði. Tann vanliga undirvísingin varð løgd niður í eina viku. Tað bar til at hava somu undirvísingargongd í báðum flokkunum á øðrum ári, tí at fleiri av lærarunum høvdu báðar flokkarnar. Tveir lærarar í toymunum høvdu fyrireikað verkætlanina í drúgva tíð.

## Skaldskapur av mannamunni - orðatøk

Skaldskapur av mannamunni er skaldskapur, sum verður borin fram munn av munni. Hetta slagið av skaldskapi stavar frá teirri tíðini, tá ið flest øll vøra varð virkað úti á gørðunum. Meðan arbeitt varð, søgdu fólk frá ymiskum til at stytta um stundir. Tá ið menn vóru á útróðri, so kundu teir taka til “tungur er tigandi róður”.

Skaldskapur av mannamunni var skaldskapurin hjá almúguni. Hetta slagið av skaldskapi kundi á ein listarligan hátt lýsa og tulka eina støðu. Til dømis kunnu vit fata ævintýr sum fittar søgur um prinsar og prinsessur, ið fáa eitt kongaríki. Sálarliga kunnu ævintýrini eisini lýsa eina støðu, har prinsurin gjøgnum royndir mennist og tekur ábyrgd. Soleiðis er eisini við orðatøkum: tey kunnu í fyrstu atløgu tykjast grunn, men ein dýpd ella vísdómur er í teimum.

Orðatøk eru fleiri túsund ára gamal skaldskapur, til dømis orðatøkini hjá Sálomon í Gamla Testamenti. Sjálvt um orðatøk eru so gomul, eru tey at hoyra av og á – enn liva nógv teirra sítt fríska lív. Vit hava eisini orðatøk, ið lýsa búskap ella hava ein búskaparligan hugburð.

## Verkætlanin

Verkætlanin hevði sum mál at kanna, hvussu orðatøk frá ymsum heimspørtum kunnu verða nýtt at læra um búskap. Orðatøk kunnu varpa ljós á búskaparliga atferð, sum búskaparfrøðin í lærubókum ikki megnar so væl. Tak til dømis russiska orðatakið “har ríkidømi valdar, er torført at knýta vinabond”, sum vil siga, at ríkidømi hevur negativa ávirkan á samveru millum fólk. Eitt annað dømi er swahilska orðatakið “ríkidømi, sum ger eigaran til træl, er ikki ríkidømi”, ið vísir á vandan, at onkursvegna kann ríkidømi taka

ræði á tí, sum eigur virðini. Orðatøk eru stuttorðað fyndarorð, sum hava livað ætt eftir ætt, og sum framvegis eru aktuell í okkara teknologisku øld.

Bæði transformativ teori[1] og humanistisk teori[2] um læring mæla til at brúka provokerandi tilfar at stimulera næmingin at hugsa og seta spurningar um síni egnu sjónarmið, til dømis hvat hann ella hon heldur um ríkidømi. Hesir spurningar kunna føra til transformatión av sjónarmiðum og eru neyðugir, um útbúgvingin skal fáa næmingin við, og um hon skal gera mun. Tilfarið kann møguliga vera enn meira provokerandi, um tað kemur frá eini aðrari mentan enn tí, sum næmingurin sjálvur er vaksin upp í. Um so er, eru orðatøk frá øllum heiminum viðkomandi í undirvísingini og læringini. Harumframt fanga orðatøk flestu fólk, tí málburðurin ofta situr væl, og kunnu tey sostatt metast sum eitt slag av skaldskapi. Orðatøk eru stutt og væl søgd og hóska tí eisini væl til okkara tíð, har alt skal ganga skjótt og helst eisini vera lætt.

## Arbeiðsháttur

Lærarartoymið valdi at brúka bólkaarbeiði sum arbeiðshátt, tí at evnið legði upp til kjak og nógvar vurderingar. Í hvørjum flokki vóru fimm bólkar. Bólkarnir vórðu settir saman soleiðis, at hvør bólkur skuldi vera ein sterk eind, har vit høvdu sterkar og veikar eginleikar hjá einstøku næmingunum í huga. Kyn var eisini havt í huga, tí at í summum orðatøkum eru kynini ein málbólkur.

Byrjað varð mánamorgunin 11. februar kl. 8.10 við kunnandi fundi, har alt lærarartoymið møtti upp. Uppgávan hjá lærarum var at vera vegleiðarar. Toymið valdi, at ein næmingur í hvørjum bólki skuldi vera talskvinna/maður fyri bólkin. Bert hesin skuldi venda sær til vegleiðararnar, so næmingarnir ikki spurdu hvør í sínum lagi. Allir bólkarnir fingu tveir vegleiðarar í part. Vegleiðarar kallaðu bólkin inn til vegleiðing eftir avtalu, har teir kunnaðu um formlig viðurskifti. Vegleiðararnir skuldu vera tøkir alla vikuna.

Næmingarnir skuldu skriva loggbók hvønn dag. Talskvinnan/maðurin fyri hvønn bólk sendi toyminum loggbókina kl. 15.00 hvønn dag, tó ikki hósdagin fyri samrøðuna fríggjadagin. Í loggbókini skuldi standa, hvat var farið fram, og hvør var møttur. Uppgávan skuldi latast inn hósdagin kl. 12.00. Bólkarnir sendu lærarartoyminum uppgávuna.

---

[1] Transformativ teori í námsfrøði er um djúpa læring, sum fer longur enn bara at ogna sær vitan, læra uttanat ella duga at endurgeva, og sum eisini ber í sær at læra at hugsa sjálvstøðugt.

[2] Humanistisk teori í námsfrøði byggir at ta hugsan, at læring er tað, sum tann lærandi sjálvur ger fyri at gagnnýta síni evni til fulnar.

## Spurningar, sum næmingarnir fingu

1. Hvat eyðkennir orðatøk sum skaldskaparslag?
   Føroyskt tilfar um eyðkenni er at finna fremst í bókini "Steinur brestur fyri mannatungu." Aftast í bókini eru nógvar keldur um orðatøk. Nógv tilfar er eisini á netinum.
   Tit skulu m.a. koma inn á málið í orðatøkum, myndamál, rútmu og fýra funktiónir, ið høvundarnir seta upp.
2. Býtið føroysku orðatøkini sundur eftir búskaparligum evnum. Tit kunnu nýta ta eingilsku sundurbýtingina sum fyrimynd, og tit kunnu taka tey orðatøk burturúr, sum tit meta ikki vera búskaparlig.
   Tit hava fingið tveir listar við orðatøkum á føroyskum og eingilskum, hesir liggja á first class.
3. Finnið orðatøk, sum tit seta upp móti hvør øðrum.
4. Finnið í minsta lagi 10 jalig og 10 neilig orðatøk um ríkidømi ella pengar (bæði útlendsk og føroysk). Metið samstundis um sambandið millum ríkidømi og eydnu, og metið um, hvørt summi orðatøk siga ímóti øðrum orðatøkum.
   Dømi um, at ríkidømi er jaligt: "Betri er sjálvur at eiga enn bróður at biðja".
   Dømi um, at ríkidømi er neiligt: "Har ríkidømi valdar, er torført at knýta vinabond."
5. Finnið orðatøk, ið hava við búskap at gera, sum tit í bólkinum ikki tulka eins, ella sum tit meta kunnu tulkast á ymiskan hátt.
6. Metið um, hvussu orðatøk kunnu brúkast til at skilja búskap, og um tey á nakran hátt kunnu lýsa búskap, sum lærubøkur ikki gera.
7. Gerið eina sølulýsing, har orðatøk verða brúkt, ella ímyndið tykkum, at tit gera eina lýsing, har eitt ella fleiri orðatøk verða brúkt. Her ræður um at nýta fyndina í orðatøkunum og raka seymin á høvdið.

## Endamál og eftirmeting

Lærarateymið hevði bæði prosess og produkt í huga. Umframt sjálva tilgongdina, har læringin skuldi vera miðpunktið, skuldu næmingarnir skriva eina stutta ritgerð á 6-8 síður. At enda skuldu teir tosa um alla gongdina.

Hvør bólkur skuldi leggja tey týdningarmestu viðurskiftini í uppgávuni fram í umleið 10 minuttir (ikki powerpoint) fríggjamorgunin. Síðan høvdu limir í bólkinum og lærarar samrøðu um uppgávuna. Serliga vildu lærarar hava fram, hvørja undran ella frustratiónir, næmingarnir høvdu í gongdini. Vegleiðararnir lósu allar uppgávurnar, men settu seg serliga inn í tær uppgávur, har teir vóru vegleiðarar. Munnlig og skrivlig eftirmeting av bólkunum varð gjørd. Næmingar fingu bæði formativa og summativa eftirmeting.

## Hvat søgdu næmingarnir?

Vit spurdu Petur, Jens og Sólvá, sum arbeiddu saman við Ara og Turið, hvussu hetta eydnaðist. Petur sigur, at tað er ógvuliga fangandi at nýta orðatøk í búskaparligum samanhangi, tí orðatøk ofta eru vís og sigandi. Jens leggur afturat, at tað kann vera hent við beinraknum orðum, tá ið tú skalt gera eina sølulýsing, og tá kann tað vera eitt sera gott hugskot at nýta eitt ella fleiri orðatøk. Sólvá, sum var í bólki saman við Peturi og Jensi, heldur, at hetta var áhugavert, og mælir til at nýta henda hátt í framtíðini, tí sum orðatakið sigur: “tað, ið ungur nemur, gamalur fremur.”

Í einum øðrum bólki vóru Anja, Jóan, Pætur, Rúni og Súsanna: Nógv stúran var at byrja við, um henda uppgáva kundi gerast áhugaverd og lærurík, men tað bleiv hon so sanniliga, sigur Anja við einum smíli. Og Pætur vísir á, at tey gjørdu eina sølulýsing, har eitt orðatak varð nýtt, og at orðatøk væl kunnu nýtast í marknaðarførslu. At enda sigur Jóan, at heitið á uppgávuni hjá teimum var "Blindar eru ókunnar gøtur", tí tey vistu ikki so nógv um orðatøk, áðrenn tey fóru í gongd við uppgávuna, men nú vit hava sitið við uppgávuni í nakrar dagar, eru hesar gøtur nakað ljósari.

# Undirvísingartilfar á veg inn í eina Internetøld

Sámal Matras Kristiansen

**Greinin er skrivað út frá notatum frá heiðursfyrilestri á fyrilestrarøðini ".fo 20 ár", hildin fyri Peturi Zachariassen, fyrrverandi lektara á Fróðskapar-setrinum, 23. januar 2015. Sámal Matras Kristiansen er limur í KT-nevndini og Pedagogisku nevnd í Hoydølum.**

Eitt øki, ið hevur verið fyri stórum broytingum vegna kunningartøkniligu menningina, er útbúgvingargeirin. Henda greinin vísir á nøkur rák, ið hava verið í samspælinum millum Internetið og undirvísing seinastu áratíggjuni. Í fyrstuni varð teldan roknað sum eitt slag av framkomnari skrivimaskinu, men tá Internetið gjørdist alsamt meiri útbreitt, byrjaði samskiftið spakuliga at fara fram á Internetinum og kundi í ávísan mun loysa ymisku "vitanar-aktørarnar" úr tíð og stað. Við tíðini er Internetið vorðið hvørs mans ogn, og tað er vorðið alsamt skjótari og meiri álítandi, sum árini eru farin. Nú á døgum eru ikki einans vitanar-aktørarnir partvíst leysrivnir frá tíð og stað, men sjálv vitanin er í stóran mun vorðin nærum universelt atkomulig.

Við tøkniligu menningini er vorðið alsamt truplari at halda fast í "góðu gomlu" undirvísingini við talvu, kriti, blokkum og blýantum. Men tað skal sigast, at hóast ymiskar vitanargreinar hava ymisk tekstasløg og ymisk vitanarformat og harvið í ymiskan mun gagn av nýggjari tøkni, so eru øll fak onkursvegna ávirkað av internetgerðini. T.d. er Internetið ein fongur fyri empiriskt tung fak sum t.d. samfelagsfrøði, ið alla tíðina tekur nýtt og aktuelt tilfar inn í undirvísingina, m.a. hagtøl. Eisini er Internetið ein fongur fyri datatung fak sum t.d. geografi, ið kann fáa stórt gagn av t.d. at fáa nýggj, interaktiv data sýnd á grafiskt hentar og dynamiskar hættir. Eisini eru nógv fak, ið hava stóra nyttu av filmum og visualiseringum, ið eru at finna á ymiskum videotænastum. Øll fak hava harumframt ein fyrimun av, at tað er lættari, skjótari og bíligari at fáa fatur í tekstum og tilfari um alt millum himmal og jørð, heldur enn at skula nýta tunga, seina og dýra pappírið. Tað er eyðsýnt, at fyrimunirnir við Internetinum eru stórir.

## Hóttanir og avbjóðingar við Internetinum

Tó skal ein ikki óttast at viðurkenna, at tað eisini eru fleiri hóttanir ella "avbjóðingar" við hesi menning. Fyri tað fyrsta er Internetið fult av skrambli, ið kann gera tað trupult at finna fram til nøktandi informatiónir. Í nógvum førum vilja næmingar illa duga at skilja millum skitt og kanel. Fyri tað næsta er avskrift vorðin lættari, tí til ber nú beinleiðis at

*copy-paste'a* tilfar, kanska umskriva tað eitt sindur og síðan lata tað inn. At fyribyrgja hesum roynir man seg við ymiskum skipanum, ið skulu avdúka svikið og vónandi ræða næmingar frá at skriva av. Fyri tað triðja er Internetið ein stór distraktiónskelda, ið lættliga kann fáa næmingar at missa fokus og harvið taka virðismikla tíð burtur frá teirri læringini, ið er løgd til rættis. Serliga nú sosialu miðlarnir hava fingið fastatøkur á fólki, er Internetið fyri summi vorðið nærum eitt rúsevni, ið fólk illa megna at halda seg frá longri tíð í senn. Tað skilst, at hetta ikki bert er ein trupulleiki á fólkaskúla- og miðnámsstigi, men eisini á universitetsstigi. Ringu vanarnir breiða seg so at siga upp gjøgnum skipanina. Tað er so nógv vitan at fara eftir, at tað kann vera trupult at fordjúpa seg í ávísum tilfari. Men enn sum áður hevur tað týdning fyri læring, at man megnar at fokusera á tað, man skal og ikki lata seg stýra av teimum bráðfeingis stuttleikum, ið munnu stinga seg upp úr Internetsugguni hvønn einansta dag. Serliga sosialu miðlarnir kunnu órógva, tá man knappliga stendur fastur í einari vitanargjógv, og valið stendur millum at arbeiða eitt sindur harðari ella at gera yvirlopshandlingar á einum sosialum miðli.

## Frá hierarkiskari til netverksgjørda vitan

Hvussu víkir og vendir, er Internetið komið fyri at vera, og tað hevur broytt vitanarsamfelagið fullkomiliga, um ein vil tað ella ei. Hóast tað helst hevur verið ein (mis)fatan, at vitan hevur verið nakað avmarkað, ið kundi skrivast niður í bøkur og setast upp á hillar, so heldur henda fatanin í alsamt minni mun. Vitan verður jú eisini til í samskiftinum um vitanina. Gaman í hava bøkur, greinir o.a. stóran týdning sum vitanarlig hjálpartól, men við Internetinum er vitanarliga samskiftið tó vorðið meiri differentierað: Formligir og óformligir vitanarformar hava fingið ein heilt nýggjan dynamikk, ið eisini bjóða gomlu fataninі av autoritativari vitan av. Henda gamla fatanin einfaldaði leiklutin hjá lærarum, tí teir kundu hava mest sum treytaleyst álit á tilfarinum, sum teir brúktu. Eisini kundu teir byggja upp ein autoritet kring bøkur, ið tað var trupult at seta spurnatekin við, hóast langt frá alt, ið kom á innbundið prent, hevði nøktandi dygd. Við Internetinum er hesin møguleikin farin. Bókatengdur autoritetur tykist í besta føri at vera gamaldags, í ringasta føri irrelevantur. Vitanaroligopolið og vitanarhierarkiið eru brotin, og dygdin á einum lærara má nú mátast eftir heilt nýggjum mátistokki. Í føroysku miðnámsskipanini sæst hetta aftur í skiftinum, sum er ígongd frá kunnleikagrundaðari til førleikagrundaða undirvísing, ið m.a. er orðað í námsætlanunum.

Hóast tað ivaleyst bæði eru ein generatiónsgjógv og ein faklig gjógv millum tey, ið síggja flestar fyrimunir og flestar vansar við Internetinum, so er Internetið komið fyri at vera. Tað skulu sterkir og ódemokratiskir máttir til at temja Internetið, so tað verður neyvan gjørt í næstu framtíð. Undir øllum umstøðum sleppa vit ikki undan, at vitan ikki longur kann skiljast sum ein "hierarkisk" tilgongd, har vitanin verður framleidd av professarum

og lektarum, síðani didaktiserað av lærubókahøvundum og ritstjórum, pedagogiskt-praktiserað av lærarum, fyri síðani at verða tikin ímóti av næmingum og studentum. Henda hierarkiska vitanarfatanin var uttan iva røtt í "nationalu" øldini, sum 20. øld í stóran mun var. Tað vóru nógvar forðingar millum lond og mentanir, og tískil fór altjóða vitanarliga samskiftið í stóran mun fram millum elitur, ið síðani lótu vitanina seyra í hóskandi dosum niður gjøgnum samfelagið.

Henda fatan gevur lítla meining longur, tó at nógv uttan iva lata sum um, at hetta framvegis er veruleikin. Tey gloyma (ella vilja ikki síggja), at við Internetinum er vitanin ei longur bert hierarkisk, men eisini netverksgjørd. Onkur vildi sagt, at vitanin er vorðin "demokratiserað". Tað ber ikki longur til hjá samfelagsligu elitunum at stýra, hvat fólk lesa, síggja og hoyra. Nú velja fólk í størri mun sjálv teirra vitan burtur úr rúgvuni, tó at nógv framhaldandi styðja seg at nationala vitanar-hierarkinum – tí tey eru uppald við tí og von við tað. Tó so, her er eisini í stóran mun ein generatiónsgjógv, og vilja tey ungu – tey "Internet-innføddu" – í alsamt størri mun fáa sína vitan gjøgnum síni ymisku sosialu netverk.

Tað eru bæði fyrimunir og vansar knýttir at hesum. At vit hava eitt nærum óendaligt hav av vitanartilboðum, er í sjálvum sær fantastiskt. Men hinvegin: jú størri havið verður, tess truplari verður at navigera í tí. Tá er skjótt at drukna í mongdini ella bara lata fakliga órelevantar ella fakliga "sjónarhornsavmarkandi" sosialar strukturar stýra hvønn veg man ferðast í informatiónshavinum. Tíðirnar, tá útvarpstíðindi ella forsíðan á Dimmu kundu skapa eina felags referansurammu, eru farnar. Uppgávan er ikki bert vorðin trupul hjá næminginum, men sanniliga eisini hjá lærarunum. Ei undur í, at nógvir lærarar droyma seg aftur í farnar tíðir, tá vitanin var greiðari strukturerað, meira haldfør, meira álítandi og minni ivaskapandi. Bæði lærarar og næmingar hava tørv á heilt nýggjum vitanarførleikum nú í mun til tíðina, áðrenn Internetið var. At navigera í kaos, at duga keldukritikk, at velja vinklar o.s.fr. eru alt førleikar, ið professionelli Internet-brúkarin nú skal duga. Hesum fáa næmingar og studentar sanniliga eisini brúk fyri framtíðini. Tað hevur týdning ikki at missa seg burtur í óendaligu vitanarmongdini, men at vera málrættaður í mun til, hvørja vitan man ynskir sær, og hvussu formatið skal vera. Í hesum viðfangi skal nevnast, at bókasavnsfunktiónin av røttum átti at verið umskipað fullkomiliga, soleiðis at bókavørðar í størstan mun høvdu sum uppgávu at hjálpa næmingum og borgarum annars at navigera í stóra og buldrasliga vitanarhavinum – um ikki annað so innan ávís fakøki. Men eins og hjá undirvísarunum halta Internet-førleikarnir hjá bókavørðunum, eins og afturhaldssinnað tankagongd eisini ger seg galdandi – bæði millum undirvísarar og bókavørðar.




## Frá kunnleikaorienteraðari til førleikaorienteraða undirvísing

Fyri at taka samanum. Vit kunnu vísa á nógvar ymiskar avleiðingar av Internetinum. 1) Vitanar-aktørarnir verða loystir úr tíð og staði, 2) vitanin verður loyst úr tíð og staði, 3) tað hendir ein avhierarkisering og ein netverksgerð av vitan, 4) tað krevjast nýggir førleikar at navigera í vitanar-havinum. Mangt annað kundi verið nevnt, men eg fari at enda hesa grein við einum poengi, ið kann knýtast til áðurnevndu vitanar-navigatiónina.

Tað er í løtuni eitt skisma innan undirvísingarheimin millum a) at nýta Internetið sum vitanar-framløguamboð og b) at nýta Internetið sum vitanar-viðgerðaramboð. Hetta er galdandi fyri øll “KST-amboð” sum heild, men eg vil her seta fokus á Internetið.

Sum heild er føroyska skúlaskipanin í einari broytingartíð, ið m.a. snýr seg um eitt paradigmuskifti frá kunnleikaorienteraðari vitan til førleikaorienteraða vitan. Ella sagt við øðrum orðum: frá einari víðarigevandi og endurgevandi fatan av vitan til eina viðgerandi og skapandi fatan av vitan. Vitan er ikki bara nakað, ið “er har”, ið kann verða tikin samanum og skrivað inn í eina bók. Vitanin verður alsamt minni statisk og alsamt meiri dynamisk. Hetta merkir, at tað er minni áhugavert at minnast ítøkilig ting, ið avoldast skjótt, men týðandi at hava førleikarnar at finna fram til neyðugu vitanina og seta hana saman á nýggjar hættir. Tað er tú sjálvur, ið skalt duga at skapa vitan, um tú ætlar tær at gerast eitt aktiv í vitanarsamfelagnum. Tískil skalt tú ogna tær tey amboð, ið skulu til fyri at viðgera og skapa vitanina. Tað serliga er her, at í alsamt størri mun liggja slík amboð á Internetinum. Internetið er fult at informatión og data, men tað nýggja er, at tað finnast alsamt fleiri amboð, ið kunnu viðgera hesi data interaktivt. Hetta er bæði eitt professionelt rák, men sanniliga eisini eitt undirvísingarligt rák. Frá at Internetið er eitt samskiftisamboð, har til ber at deila og finna tilfar, verður Internetið í alsamt størri mun ein fyritreyt fyri at kunna viðgera tilfar. Ikki bara verður okkara faktuella vitan flutt úr bókum og út á Internetið, eisini verður okkara førleikavitan flutt út á Internetið.

Hetta merkir, at vitanin ikki longur bert er loyst úr tíð og staði, men at sjálvt platformarnir til viðgerð av tilfari nú eru loystir úr tíð og staði og gera tað, at sjálvir vitanarmiðdeplarnir

uppl oysast, og fyribrigdi sum fjarlestur gerst eitt reelt og breitt góðtikið alternativ til staðbundna undirvísing. Hetta kann so sigast at vera ein 5. boðskapur í hesi grein: vitanarplatformarnir loysast úr tíð og staði.

## Myndugleikarnir eru eftirbátar í mun til tøkniligu menningina

Hetta er við at gerast ein didaktiskur og pedagogiskt-praktiskur trupulleiki, tí lógarverkið og umsitingin tykjast treyðugt at vilja fylgja við menningini innan útbúgvingarheimin. Alsamt meiri tilfar kann einans nýtast á Internetinum, men myndugleikarnir tykjast framvegis ímynda sær, at tilfar á Internetinum í grundini bert er “digitaliserað pappírtilfar”, og at Internetið mest av øllum er eitt skjótt og bíligt “posthús”. Við øðrum orðum er nógv av undirvísingartilfarinum, ið verður nýtt nú á døgum, ikki møguligt at nýta til próvtøkur, har Internetið ikki er loyvt. Við øðrum orðum er eitt langt glopp millum intentiónirnar í nýggju námsætlanunum og galdandi regluverk, tó at batar eru. Harumframt hevur tað gingið trekt at menna og nýta nýggjar LMS-skipanir, og tað hevur eisini lagt fótonglar.

Og hetta gloppið vil trygt, men spakuliga, menna seg til eina gjógv millum tann sera konservativa vitanarhugburðin frá landsins myndugleikum og skúlanna leiðslum og tann alsamt broytandi veruleikan, ið skúlarnir førka seg inn í. Tó so, batar eru at hóma, men tað gongur striltið, og nógvar kreftir arbeiða framvegis ímóti rákinum, kanska serliga av ótta fyri avskrifts- og distraktiónstrupulleikunum, ið standast av Internetinum. Men næmingar mugu læra at orientera seg í vitanarhavinum, og hvussu skulu teir tað, um teir ikki fáa høvi at venja seg at navigera trygt um Internetsins brot og vandasker? Ella við øðrum orðum: vit mugu skipa undirvísing, ið leggur upp til “21. aldar-førleikar” (21st century skills).

---

P.S.: Las herfyri eina áhugaverda grein í Skúlablaðnum (nr. 1/2016, s .17), har Sugata Mitra, professari í undirvísingartøkni orðar seg soleðis: *“Um vit vilja broyta mátan, lærarar undirvísa upp á, mugu vit fyrst broyta próvtøkurnar. Tá ið próvtøkuhættirnir verða broyttir, broytist undirvisingin av sær sjálvum. Smáar broytingar mugu gerast í próvtøkuskipanini fyri at skumpa restina av undirvísingarskipanini rætta vegin.”* Aðrastaðni í sama blaði (s .15) er onnur grein um KT í undirvísingini, har Rói Joensen og Sigfríður Sólsker skriva soleiðis: *“KT ger tað læ ttari hjá næmingunum at samskifta, granska, vitanardeila og skapa, og tað verður lættari hja læraranum at næmingatillaga undirvísingina við at brúka KT, men tað er eisini umráðandi at broyta undirvísingina, so hon miðar ímóti at læra næmingarnar framtíðar førleikar. Uppgávan hjá læraranum er at hjálpa næmingunum at gerast kritiskir og refleksivir teinkjarar.”*

P.P.S. Eg vil, umframt hesa greinina, viðmæla aðrar greinar um líknandi evni, ið liggja á mínum bloggi "Sámalsa bókasavn". Skrivið yvirskriftirnar inn í eina leitimaskinu, so finna tit tær lættliga.

- Talgilt undirvísingartilfar til talgilda veruleikan
- Samvirknar talvur – men hvussu tá samvirknar?
- Nýtt heimatlas misjavnt í góðsku og relevansi
- Kritikk av føroysku sektiónini í nýggja atlasinum

# Hví duga børn í Eystur-Asia betur at rokna enn børn í Vesturlondum?

Olav Absalonsen

**Í hesi greinini verður víst á gransking, sum staðfestir, at børn í Kina (Taiwan), Hong Kong, Japan, Korea og Singapore eru nógv betur fyri í støddfrøði enn javnaldrar teirra í londum sum USA, Bretlandi, Frankaríki og Týsklandi. Ymisk sjónarmið verða førd fram, hví hetta man vera so. Ein orsøk er málslig, men helst eru eisini søguligar og mentanarligar forkláringar.**

## Talorðini hava týdning

Børn í Japan og Kina klára seg ferð eftir ferð betur í støddfrøði enn børn í londum um okkara leiðir og í Amerika. Tað kann vera, at tað eru onkrar mentanarligar orsakir til hetta. Men málið hevur eisini týdning. At læra multiplikatiónstalvur er nógv lættari hjá japonskum og kinesiskum børnum, tí talorðini eru nógv styttri og einfaldari, til dømis si fyri 4 og qi fyri 7 á kinesiskum.

Grammatisku reglurnar fyri talorð á kinesiskum og japonskum eru eisini nógv lættari enn á eingilskum, fronskum, týskum og føroyskum. Kinesisku reglurnar fyri talorð, ið umboða tøl størri enn 10 eru tíggju eitt fyri 11, tíggju tvey fyri 12, tíggju trý fyri 13 og so víðari upp til tvey tíggju fyri 20, tvey tíggju eitt fyri 21, tvey tíggju tvey fyri 22 og so víðari. Hugsa um, hvussu nógv fløktari hetta er á evropeiskum málum. Á fronskum eitur 97 quatre-vingt-dix-sept (fýra ferðir tjúgu, tíggju og sjey), og 54 eitur á týskum vierundfünfzig (fýra og fimmti). Á fronskum er tjúgutalsskipanin nýtt í talorðum, og á týskum kemur eittarin framum tíggjaran í talorðinum. Á eingilskum er støðan heldur frægari, tá ið tølini koma upp um 30, men har er eitt annað óreglusemi í talorðunum: frá 13 til 19 telur man øvutan veg á eingilskum (thirteen, nineteen), men síðani verður talt hinvegin, soleiðis at 30 eitur thirty, og 90 eitur ninety. Á føroyskum hava vit alt tað ringasta, sum eisini finst í týskum og fronskum talorðum. Fyri 97 siga vit sjey og hálvfemsinstjúgu, sum merkir sjey og hálva fimtu (4½) ferðir tjúgu, og fyri 54 siga vit fýra og hálvtrýss, sum merkir fýra og hálva triðju (2½) ferðir tjúgu, og tað skal næmingurin so umseta til 10-talsskipanina.

Børn í Eystur-Asia sleppa undan hesum fløkjasligu vesturlendsku talorðunum. Tá ið kinesisk børn eru 4 ár, duga tey flestu at telja upp í 40, meðan bretsk børn á sama aldri klára ikki meir enn upp í 15, og tað tekur teimum eitt ár afturat at læra at telja upp í 40. Hvussu kunnu vit vita, at hesin munur stendst av talorðunum í málunum? Jú, børn í Eystur-Asia og børn í Vesturlondum vísa eins góð evni at telja upp í 12. Munurin kemur, tá

ið børn í Bretlandi møta teimum øðrvísi reglunum at gera talorð, tá ið tølini fara upp um 12. Børn í Kina hinvegin halda fram við at brúka somu reglur, sum eru galdandi upp til 12.

Umframt tað, at talorðini eru lættari at læra, so gera kinesisku talorðini, at tað er nógv lættari at rokna á kinesiskum, tí málreglurnar líkjast tí arabisku 10 tals-skipanini. Ein kinesiskur næmingur sær á tí málsliga bygnaðinum, at talið 'tvey tíggju fimm' (tað er 25) er samansett av tveimum tíggjum og fimm. Tann føroyski næmingurin skal minnast, at fimm og tjúgu umboðar tvey tíggir og fimm, og hann verður eisini órógvaður av, at vit eins og á donskum og týskum lesa skeivan veg, tá ið vit siga fimm og tjúgu í staðin fyri tjúgu fimm. Ikki tí, frá 13 til 19 lesa vit eisini skeivan veg (trettan stendur fyri trý og tíggju).

Bið ein føroyskan næming leggja tvey og tjúgu og sjey og tretivu saman í høvdinum. Hann má fyrst umseta orðini til tøl (22+37). So kann fara í holt við at rokna: 2 pluss 7 er 9, og 20 pluss 30 er 50, so úrslitið verður 59. Spyrt tú ein næming í Eystur-Asia, hevur hann ikki fyri neyðini at umseta talorðini til tøl, tí tey liggja í orðunum. At tað er so nógv lættari í Eystur-Asia, ger helst, at allur hugburðurin til rokning verður øðrvísi. Børnini har síggja eitt mynstur í tølunum, sum ger, at tey vænta, at hetta kunnu tey læra. Eisini í brøkrokning hava asiatar tað lættari. Í staðin fyri tríggjar fimtingar siga kinesarar 'av fimm pørtum tak tríggjar'. Tað sigur nakað um innihaldið í brøkinum, har nevnarin og teljarin verða forkláraðir. Edward Frenkel, sum varð føddur í Russlandi, fortelur hesa søgu um, hvussu nógv málið hevur at siga í rokning: *Spyr ein fullan russara, hvat er størri – tveir triðingar ella tríggir fimtingar, og tú fært neyvan eitt skilagott svar. Men spyrt tú hann, hvat er meiri í part – tvær fløskur av vodka til tríggjar menn ella tríggjar fløskur til fimm menn, so veit hann við vissu, hvat tað snýr seg um.*

Tá ið børn í Vesturlondum koma í triðja ella fjórða flokk, byrja nógv so smátt at missa mótið um rokning, og hetta mótloysið kemur helst av, at rokning sær ikki út fyri teimum at geva nakra meining. Tann málsligi bygnaðurin við tølum er klossutur, og reglurnar tykjast tilvildarligar og fløktar. Asiatisk børn hinvegin uppliva ikki hesa forðing í sama mun. Tey kunnu hava fleiri tøl í høvdinum og rokna skjótari, og mátin at siga brøkar samsvarar væl við tað, sum ein brøkur er – og tað ger tey helst eitt sindur meira áhugað í støddfrøði, og tað hevur aftur við sær, at teimum dámar betur støddfrøði, og av tí at teimum dámar betur støddfrøði, arbeiða tey meira við henni, soleiðis at hetta blívur ein góð ringrás.

## Rísmarkir og støddfrøði

Japan og teir fýra asiatisku tikararnir Hong Kong, Korea, Singapore og Taiwan hava aldar-gamla siðvenju at dyrka rís. Sambært Gladwell er tað at dyrka rís eitt sera tíðarkrevjandi arbeiði. Lívið hjá einum rísdyrkara var at arbeiða trý túsund tímar um árið. Tað er eisini greitt samanhang ímillum arbeiðið, tú leggur í hetta, og lønina fyri arbeiðið, og tað gevur

arbeiðnum meining. Meira tú arbeiðir, størri verður grøðin. Tað er heldur ikki nakað einfalt arbeiði at dyrka rís. Tað er ikki bara at sáa um várið og heysta um heystið. Tað er sum at hava eina fyritøku, gagnnýta arbeiðsevnini hjá familjuni, minka um óvissu við fræi, byggja fjølbroyttar vatnveitingarskipanir, og samskipa eina fløkta tilgongd at heysta ein skurð og samstundis fyrireika tann næsta.

Harumframt er hetta eitt sjálvstøðugt arbeiði. Nógvastaðni í Evropa arbeiddu smábøndur sum undirløntir trælir hjá ríkum góðseigarum. Men Kina og Japan fingu ongantíð eina kúgandi feudala skipan, sum kom í Evropa, tí feudalisma hevði ikki virkað í einum búskapi, ið hevur rís sum høvuðsvinnu. At dyrka rís er for fløkt og torgreitt í einari skipan, sum krevur, at bøndur verða tvingaðir og hóttir at fara til arbeiðis hvønn morgun. Góðseigarar í Kina blandaðu seg ikki upp í arbeiðið hjá smábóndunum. Teir tóku eina fasta leigu, og lótu bøndurnar passa sínar fyritøkur.

Gladwell vísir á gransking, sum hevur samanborið russisk og kinesisk orðatøk. Russisk orðatøk innan jarðarbrúk eru ofta fongd við fatalismu og pessimismu, meðan tey kinesisku eru merkt av, at tað ræður um at arbeiða hart fyri føðina. Her eru nøkur dømi:

- Eingin matur uttan blóð og sveitta
- Um veturin frystir tann lati í hel
- Um maður arbeiðir hart, verður jørðin ikki kørg
- Eingin fer upp fyri dag 360 dagar um árið og ger ikki familju sína ríka

Hesin hugburður merkir asiatiska mentan enn í dag. Sambært Gladwell er tað vanligt á vesturlendskum universitetum, at asiatiskir studentar hava orð á sær at sita á bókasavninum langt aftaná, at øll onnur eru farin. Fólk, sum hava klárað seg væl, hava arbeitt hart, og mentanin, sum kom fram í rísmarkunum í Asia, hevði tann hugburð, at í óvissu og fátækradømi gav hart arbeiði meining, og sæst hetta eisini aftur í førleika innan støddfrøði.

## Hevur longdin á skúlaárinum týdning?

Í Asia hava næmingar ikki langa summarferiu, tí í samfeløgum við einari mentan, sum trýr upp á at fara upp fyri dag 360 dagar um árið, fer man ikki at geva børnunum tríggjar mánaðir í summarferiu. Sambært Gladwell er skúlaárið í USA í miðal 180 dagar, í Suður Korea er tað 220 dagar, og í Japan er tað 243 dagar. Í Føroyum er skúlaárið 199 dagar á grundnámi og á miðnámi.

Longdin á skúlaárum er siðvenja hjá okkum og aðrastaðni, og hetta er sjáldan ein spurningur, ið verður viðgjørdur við broyting fyri eyga. Men granskarar í USA og aðrastaðni hava arbeitt við hesum evninum og eru komnir fram til áhugaverdar niðurstøður um, hvørja ávirkan summarferiur hava á læringina hjá børnum úr ymiskum

samfelagsløgum. Til dømis býtti Karl Alexander næmingar í Baltimore sundur í tríggjar bólkar eftir sosioøkonomiskum klassum: tey fátæku, miðalklassin og tey ríku. Næmingarnir blivu testaðir hvørt ár frá fyrsta til fimta flokk. Í fyrsta flokki var ikki stórur munur ímillum bólkarnar, tó at tey ríku dugdu best og tey fátæku ringast, men sum frá leið, gjørdist munurin størri og størri ímillum næmingar úr ríkum familjum og næmingar úr fátækum familjum.

Í Baltimore blivu næmingarnir testaðir hvørt ár í juni og í september. Í tíðarskeiðnum frá september til juni var eingin munur á framstigunum, sum næmingar úr teimum trimum samfelagsbólkunum gjørdu. Men munurin ímillum samfelagsbólkarnar øktist hvørja ferð næmingar høvdu havt summarferiu, tá ið læringin hjá næmingum úr fátækum familjum steðgaði upp, meðan tey ríku gjørdu framstig í summarferiuni í lesing og rokning. Aðrar kanningar vísa, at næmingar úr ringum korum gera afturstig í summarferiuni. Men niðurstøðan er í báðum førum, at børn úr fátækum familjum læra minni í skúlaaldri enn børn úr ríkum familjum, og hesin munur kemur, meðan børnini hava summarferiu.

Í londum við stórum stættamuni – sum til dømis USA – er støðan tann, at um tú ert føddur í fátækum korum, so fært tú minni burtur úr skúlanum, tú fært neyvan nakra útbúgving, og tískil verður tú verandi fátækur. At summarferian hjá skúlanum er long, er størsta orsøkin til, at munurin ímillum rík og fátæk verður verandi. Búskaparliga er hetta eisini óheppið, tí samfelagið gagnnýtir ikki evnini hjá børnunum at mennast. Øðrvísi er í londum í Eystur-Asia, har skúlaárið er nógv longri. Hetta er við til at geva teimum fátæku møguleika at mennast og fáa eina útbúgving. Hesi lond fáa eisini ein búskaparligan fyrimun av hesum, tí evni og menniskjaligt tilfeingi verður nógv betur gagnnýtt.

## Keldur

Devlin, Keith. 2001. *The Maths Gene: Why everyone has it, but most people don't use it,* Phoenix, London.

Frenkel, Edward. 2014. *Love and Math: The Hearth of Hidden Reality*, Basic Books, New York.

Gladwell, Malcolm. 2008. *Outliers: The Story of Success*, Allen Lane, Penguin Books, London.

*Úr søguni um búskaparliga hugsan*

# Johann Heinrich von Thünen – og avbyrgdi staturin

Olav Absalonsen

**Johann Heinrich von Thünen (1783-1850) er ein týðandi persónur í søguni um búskaparliga hugsan. Hann var slóðbrótari í ástøði um staðseting, í ástøði um framleiðslu og innkomubýti og í at nýta støddfrøði í búskaparfrøði. Hann var ógvuliga empiriskur í hugburði og brúkti skrásetingar úr veruleikanum at undirbyggja búskaparligar reglur.**

Johann Heinrich von Thünen varð borin í heim í Oldenburg í Týsklandi. Hann var bóndasonur og nam sær útbúgving sum agronomur (búfrøðingur) á landbúnaðarskúla í Celle. Longu í lestrartíðini í Celle hevði hann kritiskan hugburð um tað, sum lærarar á skúlanum hugsaðu. Eftir landbúnaðarskúlan helt hann fram at útbúgva seg á universitetinum í Göttingen, har hann millum annað las bókina *Wealth of Nations* eftir Adam Smith. Hann varð sera hugtikin av bókini, sum gav honum ambitiónir at geva sítt íkast til búskaparfrøðina.

Ístaðin fyri at velja sær eina akademiska yrkisleið keypti hann ein garð nærhendis Mecklenburg. Garðurin var í sera ringum standi, tá ið hann yvirtók hann. Men undir kønari leiðslu av Thünen sjálvum bleiv garðurin útbygdur til eitt nýmótans og fyrimyndarligt landbrúk. Búskapurin hjá landbrúkinum var eftir hansara tykki ein spegilsmynd av samfelagnum, og við teimum praktisku royndum, hann gjørdi innan landbúnað, fekk hann størri ástøðiligt innlit í, hvussu ein størri búskapur virkar. So við og við savnaði hann tilfar til høvuðsverkið hjá sær *Der isolierte Staat in Beziehung auf Landwirtschaft und Nationalökonomie*, sum kom út í tveimum bindum, tað fyrra í 1826, tað seinna í 1850.

## Staðseting

Thünen gjørdi sær ein myndil, har hann hugsaði sær ein stóran bý, sum var umgyrdur av einum stórum og fruktargóðum landbúnaðarøki. Allastaðni í økinum er jørðin egnað at dyrka, og er hon líka fruktargóð allasaðni. Langt burtur frá býnum er jørðin ódyrkaður hagi, og einki samskifti er við umheimin. Hetta er tann avbyrgdi staturin. Lesarin verður biðin um at hugsa sær hesa abstraktiónina, sum er fiktiv, men sum onkursvegna líkist tí veruliga lívinum. Við hesum einføldu fortreytum spyr Thünen síðani, hvørji sløg av jarðarbrúki fara at vera undir hesum umstøðum, og hvussu landbúnaðurin fer at verða ávirkaður av, hvussu langt frá býnum, eitt landbrúk er.

Hesir spurningar hava sjálvsagt stóran praktiskan týdning, og Thünen er sannførdur um, at svarini, sum kunnu fáast burtur úr tí fiktiva myndlinum, eru viðkomandi í tí veruliga heiminum, har alt ikki er so einfalt. Thünen ger sær greitt, at greiningin má vera grundað á áhugamálini hjá teimum, sum gera av, hvørjar plantur skulu dyrkast, og hvussu. Tað eru bøndurnir sjálvir, sum taka hesar avgerðir. Thünen visti um nakar, hvørji áhugamálini hjá bóndunum vóru. Hann gekk út frá, at teir vilja dríva landbrúkið so væl, sum møguligt. Við øðrum orðum vilja teir maksimera avlopið av rakstrinum.

Hvussu nógv grøði fæst burtur úr einum jarðarteigi av ávísari støðd, veldst um, hvussu nógv arbeiði verður lagt í hetta, og Thünen gongur út frá, at marginali arbeiðs-produktiviteturin er positivur og minkandi. Arbeiðslønin er tann sama í øllum avbyrgda statinum, og tann einstaki bóndin hevur onga ávirkan á tað. Tá ið ein bóndi undir hesum umstøðum ætlar at fáa so stórt avlop sum møguligt, vil hann brúka arbeiðsmegi upp til tað punktið, har virðið av marginala produktivitetinum er tað sama sum arbeiðslønin. Sambært Sandmo er hetta helst fyrstu ferð í bókmentunum, at júst hesar treytir fyri optimalitet eru útleiddar, og hevði tað verið nóg mikið at givið Thünen eitt pláss í søguni um búskaparfrøði. Men hann fór víðari við hesi hugsan.

Vit siga nú, at tann einasta vøran, sum landbrúkið dyrkar, og sum vit siga er korn, verður seld í tí stóra býnum fyri ávísan prís, og at flutningskostnaðurin inn í býin er proportionalur við, hvussu langt tað er til býin. Eftir hesum má prísurin, sum verður brúktur at rokna virðið á marginalu framleiðsluni, vera nettoprísurin, sum er søluprísurin í býnum minus flutningskostnaðin, og kemur soleiðis til, at tað at vera longri frá marknaðinum hevur somu ávirkan á framleiðsluna sum lægri prísur í býnum. Tann optimala nýtslan av arbeiðsmegi verður sostatt har, sum nettoprísurin faldaður við marginala arbeiðsproduktivitetinum er tað sama sum lønin.

Av tí at nettoprísurin er lægri, jú longri landbrúkið er frá býnum, má marginali arbeiðs-produktiviteturin vera størri í landbrúkum, sum eru langt frá býnum, tí at marginali produktiviteturin faldaður við nettoprísinum má vera tað sama, tá ið lønin er tann sama. Av tí at marginali produktiviteturin er minkandi við vaksandi arbeiðsmegi, verður nýtsla av arbeiðsmegi fyri ein jarðarteig av ávísari støðd minni, jú longri landbrúkið er frá tí stóra býnum.

Hesin hugsanarháttur er beinrakin, greiður og einfaldur. Hann kann eisini verða fataður upp á tveir mátar. Fyri tað fyrra kann hann skiljast sum ein lýsing av einum búskapar-ligum ástøði um bygnaðin í landbúnaði. Fyri tað seinna kann hann eisini verða tulkaður sum ein háttur hjá jarðarbrúkarum at taka avgerðir. Um tú hevur ein garð langt frá býnum, er tað neyvan skilagott at nýta somu tøknina í framleiðsluni, sum tey best drivnu

landbrúkini nærri býnum. Flutningskostnaðurin ger, at tað loysir seg betur at hava eina minni arbeiðskrevjandi tøkni.

Sambært Sandmo er Thünen helst tann fyrsti at koma við einum gjøgnumført logiskum átøði um staðseting av virksemi og ekvilibrium av staðseting. Hann gjørdi teir ástøðiligu karmarnar meira almennar, enn omanfyri lýst, soleiðis at teir eisini fevndu um dømi, har bøndur dyrkaðu nógvar ymiskar vørur. Og niðurstøðan av hesum var, at vørur við størsta flutningskostnaði verða dyrkaðar nær býnum, meðan landbrúk longri burtur frá býnum leggja seg eftir at dyrka vørur við lægri flutningskostnaði í forhold til marknaðarprísin.

## Framleiðslufaktorar

Ein týðandi táttur í greiningini hjá Thünen er optimeringin av, hvussu nógv arbeiðsmegi skal verða nýtt, og har kom hann til, at maksimering av vinningi ber í sær, at virðið av tí marginala arbeiðsproduktivitetinum má vera tað sama sum arbeiðslønin. Hann vísti eisini á, at henda greiningin er galdandi í øðrum vinnum enn landbúnaði, og í teimum førum, har tað eru fleiri broytiligir framleiðslufaktorar enn arbeiðsmegi. Eitt nú viðgjørdi hann dømið, har tað eru tveir broytiligir framleiðslufaktorar: arbeiðsmegi og kapitalur. Effektiviteturin av kapitali verður mettur eftir øking í framleiðslu sum avleiðing av øking í kapitali. Í hesum sambandi er arbeiðsmegin hildin óbroytt, men kapitalurin er ein broytilig stødd. Set nú fyri, at vit halda kapitalin óbroyttan, og arbeiðsmegin verður økt. Í tí førinum verður effektiviteturin av arbeiðsmegini sæð sum øking í framleiðslu sum avleiðing av, at ein arbeiðari kemur afturat.

Støddfrøðiliga er her talan um partiella differentiering umsett til vanligt mál. Sum Thünen sjálvur sigur: *Mátin hjá okkum at maksimera vinningin á henda hátt samsvarar við tann mátan, sum verður brúktur í støddfrøði at áseta maksimum virðið á einari funktión við fleiri variablum*. Sostatt hevur Thünen eitt fullfíggjað ástøði um optimala nyttu av framleiðslufaktorum á einum marknað við fullkomnari kapping. Navnið fullkomin kapping varð ikki vanligt, tá ið hetta varð skrivað í 1850, men vit kunnu tulka hetta so, tí hann gongur út frá, at hvørki prísirnir fyri framleiddu vørurnar ella prísirnir fyri framleiðslufaktorarnar eru treytaðir av avgerðum hjá tí einstaka framleiðaranum.

Thünen gekk út frá, at útboðið av arbeiðsmegi var ein givin stødd, soleiðis at lønarlagið bleiv ásett eftir eftirspurninginum eftir arbeiðsmegi, og hesin eftirspurningur var so ein avleiðing av atferðini hjá framleiðarum og ástøðinum um marginalan produktivitet. Eitt, sum eyðkendi teoriina hjá Thünen um staðseting, var, at arbeiðslønin var tann sama hjá øllum framleiðarum, og tað má so vera treytað av, at arbeiðarar kunnu skifta ímillum arbeiðsgevarar uttan stórvegis forðingar.

## Hví er Thünen so ókendur í dag?

Samuelson og Sandmo eru á einum máli um, at Thünen eigur eitt stórt pláss í søguni um búskaparliga hugsan. Men hví er Thünen kortini so ókendur? Samuelson vísir á tvær orsøkir, sum kanska hanga eitt sindur saman: Onnur er, at búskaparfrøðingar sum til dømis Böhm-Bawerk hava niðurgjørt Thünen fyri at føra seg sjálvar fram. Hin er Thünen sjálvur, sum brúkti stórar nøgdir av blekki at undirbyggja ein frymil fyri natúrliga lønarlagið í einum samfelag. Hesin løgni frymilin, sum ikki er viðurkendur í búskaparfrøði, hevur onkursvegna skuggað fyri teimum meira slóðbrótandi hugsanum, sum Thünen kom við, og sum eru lýstar fyrr í hesi greinini. Samuelson førir fram, at tað var Thünen, sum menti tey klassisku ástøðini hjá David Ricardo um marginalismu til neoklassiskan marginalan produktivitet.

Sambært Sandmo spjaddist nýhugsan innan búskap seint í 19. øld. Undantakið í hesum sambandi var Bretland við teimum flestu av teimum kendastu búskaparfrøðingunum, sum vistu um arbeiðini hjá hvørjum øðrum, og sum í summum førum kendust heilt væl. Inni á meginlandinum arbeiddu menn sum Thünen, Cournot[3], Dupuit[4] og Gossen[5] undir heilt øðrum treytum. Teir granskaðu mestsum í einsemi og høvdu ongar javnlíkar at kjakast við. Tilgongdin hjá teimum til búskaparligar spurningar var eisini øðrvísi enn hjá teimum klassisku bretunum. Hesir fýra vóru slóðbrótarar innan tað økið, sum vit nú kalla mikrobúskaparligt ástøði um avgerðir hjá einstøkum virkjum og brúkarum. Hetta ástøðið er grundarlag undir greining um, hvussu prísir verða til.

## Keldur

Samuelson, Paul A. (1983), Thünen at Two Hundred, *Journal of Economic Literature,* Vol. 21, No. 4 (December), pp. 1468-1488.

Sandmo, Agnar (2011), *Economics Evolving – A History og Economic Thought*. Princeton: Princeton University Press.

[3] Sí Miðnámsrit nr. 3.
[4] Sí Miðnámsrit nr. 2.
[5] Sí Miðnámsrit nr. 7.

# Brot úr viðtali við Jonhard Mikkelsen í *Góðan morgun Føroyar*

Tórður Johannesarson

**Í dag er óhugsandi hjá skúlanæmingum á øllum stigum ikki at hava orðabøkurnar hjá Sprotanum. Eitt nýtt orð er eisini sprottið, ið sipar til Sprotan, nevniliga orðið at sprota. Vit upplivdu eitt slag av uppreistri millum brúkarar í 2014, tá ið tað almenna ikki vildi stuðla. M.a. fóru næmingar upp á barrikadurnar, og 16. januar 2015 kundu øll brúka orðabøkurnar aftur, men nú ókeypis. Tann 1. mars í 2016 var viðtal við ritstjóran á Sprotanum, Jonhard Mikkelsen, um nýggju orðabøkurnar hjá Sprotanum. Rúni Jákupsson og Kári Olsen gjørdu samrøðuna. Teir hava verið so beinasamir at lata okkum endurgeva brot úr samrøðuni.**

**Rúni: Sprotin hevur tikið nýggja skipan í nýtslu, sum hevur nógv fleiri funkur enn tann gamla. Hvussu er hetta menningararbeiðið? Hendir menning hvønn dag?**

**Jonhard:** Jú, orð streyma inn í okkara mál hvønn einasta dag. Ritstjórarnir, sum knýttir eru at Sprota-pallinum, skulu taka støðu til, hvussu hetta og hatta eitur á føroyskum. Tað fyrsta liðið í hesum arbeiði fer sum oftast fram á Fróðskaparsetrinum, har serfrøðingar, móðurmálsritstjórarnir, Málstovan og Málráðið eru. Tey taka støðu til alt tað, sum vit senda teimum. Tá ið vit í felag hava funnið útav, hvussu vit skulu týða eitt orð ella flokka eitt orð eftir bendingarmynstri, kemur tað til okkara, og vit leggja tað inn í hinar fremmandamálsorðabøkurnar. Tað er eitt arbeiði, sum fer fram hvønn einasta dag á øllum mótum.

**Rúni: Tað eru sera nógv, sum brúka bøkurnar á netinum. Frætta tit frá brúkaranum?**

**Jonhard:** Ja, tað gera vit hvønn dag. Tað eru so nógv eygu á orðabøkurnar hvønn einasta dag. Tá ið vit fyri einum 5-6 árum síðan høvdu vanligu gjaldsskipanina, og brúkarin skuldi innrita seg, høvdu vit 1.400 brúkarar um vikuna, og nú tú sleppur frá at rita teg inn og skalt ikki gjalda, er talið rokið úr 1.400 upp í 14.000 um vikuna. Tað merkir, at næstan triði hvør føroyingur er inni á Sprotanum hvørja viku. Hagtølini, sum vit ganga út frá, vísa, at bara seinasta árið hava verið 8,5 milliónir leitingar inni á skipanini.

**Rúni: Hvussu er hetta talið í mun til tað, tit høvdu roknað við?**

**Jonhard**: Eg havi ikki ánilsi av, hvat vit roknaðu við. Vit hildu helst, at fóru millum 2.000 og 4.000 fólk at brúka orðabókina, so hevði tað verið gott, men 8,5 milliónir leitingar seinastu 12 mánaðirnar slær øll met.

**Rúni: Tit frætta sum sagt frá brúkarum. Hvør er tað, sum sigur frá?**

**Jonhard:** Vit sita á øllum møguligum mótum og arbeiða. Tað kunnu til dømis vera landmátarar, fólk í einum banka, tey á skipasmiðjuni, sum vilja hava okkurt málsligt at rigga. Málið er sundurgreinað í serøki, og tað sær út til at vera eina sunnur gróður í tí, og hesi kunnu so finna upp á at venda sær til okkara og koma við afturmeldingum. “Soleiðis siga vit í bankanum, soleiðis siga vit landmátarar, tá ið vit gera tað og tað!” Hetta taka vit til eftirtektar og royna at skráseta tað allastaðni í okkara orðabókum.

**Rúni: Um ein í bankanum sigur, at soleiðis siga vit, hvørji eru so útlitini fyri, at Sprotin tekur tað við?**

**Jonhard**: Sannlíkindini eru, at vit altíð taka tað inn, tí at vit kunnu altíð meta um, hvørt hetta er eftirfarandi ella ikki. Er okkurt ivamál, so hava vit samráðingar við Málstovuna, og so fáa tey, sum venda sær til okkara, boð aftur, um tað verður lagt inn, ella hvørja lagnu uppskotið fær. Teinurin millum orðabókabrúkaran og ritsjóran var so øgiliga langur fyrr, tú hevði einki samband millum ritstjóran og brúkaran annað enn tað, sum ritstjórin fann upp á at kanna vísindaliga av hesum og hasum. Nú sita brúkari og ritstjóri inni á sama miðli og “práta saman”.

**Rúni: Tað er ein fyrimunur hjá báðum pørtum?**

**Jonhard**: Tað kanst tú ætla, tí at hesir 14.000 brúkararnir, sum eru inni hvørja einastu viku, hava ein kunnleika, sum ritstjórarnir mangan ikki vita so nógv um. Tað kunnu vera øki, sum teir ongantíð hava verið inni á. Tað sær út til, at nógv av teimum ungu, t.d. á miðnámsskúlum og aðrastaðni, sum brúka orðabøkurnar, eisini melda aftur til okkara. Hetta eru sera góðar afturmeldingar. Eg skal geva eitt dømi: Nú ein dagin skrivaði ein, at summar av teimum tøkniligu umsetingunum av orðunum *headphones* og *earbox* eru ov maggutar, tær hoyra til eina aðra tíð, varð sagt. Eg segði so við viðkomandi: kom so við einum góðum uppskoti, sig mær, hvussu tey siga! Hesin segði, at orðið *earbuds* t.d. eitur millum ung hoyriproppar. Øll vita, hvat oyrapropppur er, men hetta er ein hoyriproppur; hetta var eitt dømi um eitt orð, sum ungfólk skapa. Tað er tekin um fantastiska sunnan áhuga og skapandi málsligan hug. Eg ringdi til Málstovuna, og har hildu tey, at hetta var eitt stak heppisliga valt orð. Hatta er dømi um, at vit øll eiga málið, og tað er ongantíð so eyðsýniligt sum nú, at ein og hvør kann ringja og skriva til okkara at siga, at hetta er ikki nóg gott, ella: eg havi funnið ein feil, ella: hetta áttu tit at lagt aftrat. Tað er frálíkt.

**Kári: Tað er skjótt frá brúkara til ritstjórnina?**

**Jonhard:** Tøknin er soleiðis nú, at allar tær skipanir, sum vit sita við aftan fyri ta flatuna, sum brúkarin brúkar, er eisini so einføld, at tá ið vit hava samtykt, at hetta er gott uppskot ella gott orð, og leggja tað út, er tað hjá brúkaranum í somu løtu. Samstundis kemur eisini út í høgra bredda á orðabókini ein frágreiðing, sum sigur, at hetta orðið varð lagt inn tann og tann dagin. Og tað merkir, at ein og hvør kann fylgja við tí, vit gera. Tað kann vera stuttligt nú, men tað er ikki minni stuttligt um nøkur ár, tá ið vit fara at kanna føroyska málsøgu. Tú kanst tá fylgja orðinum - tað og tað árið varð tað og tað orðið lagt inn. Einaferð verður tað áhugavert. Fert tú t.d. inn á 24. februar 2016, so sært tú, at orðið *revenant* er lagt inn. Orðið var ikki í orðabókini, men eftir Oscar-handanina, bleiv orðið týtt og lagt inn. Tá ið vit hava lagt slík orð inn, kunnu vit eisini leggja samheiti inn. Tá ið Sprotatíðindi koma út, hava vit ofta ein lítlan teig, sum eitur "Tað góða orðið". Har hava vit t.d. greitt frá, hvat orðið a *revenant* merkir, og hvørjum sagnorði tað kemur av.

**Rúni: Vit hava sæð, at tit hava í lýsingum boðað frá broytingum, nýggjum funkum. Hvat er tað nýggja, sum Sprotin hevur at bjóða?**

**Jonhard:** Hetta er eitt tøkniligt skarvslop, vit hava gjørt, tí at vit mugu loysa okkum frá teimum gomlu orðabókum, sum vit kenna. Í gomlu orðabókunum var alt samanstappað og stúvað, og tað var sera torført at lesa. Úrslitið var, at nógv góvu skarvin yvir, tá ið teigarnir vóru langir og samanpakkaðir. Hesar tøkniligu avmarkingar hava vit ikki nú á døgum. Um tú t.d. slært eitt orð upp sum kvørkveggja, so kanst tú síggja mynd av fuglinum. Tað hevur tú ongantíð kunnað gjørt fyrr, tí at tað ikki hevur verið pláss fyri myndum. Nú kunnu vit leggja fínar myndir av sama fugli inn. Tað halda vit námsfrøðiliga vera sera heppið og brúkaravinaligt.

**Rúni: So tað, sum plagdi at vera ein orðabók, sum vit kenna hana, flytur seg til at blíva nakað heilt annað?**

**Jonhard:** Hon fer helst at líkjast eini alfrøði, men tað skal ikki skiljast á tann hátt, at vit fara at hella alt millum himmal og jørð niður í orðafrágreiðingar; tað verður tað ikki, men vit hava møguleika at leggja leinki inn har. Tað er eitt stórt framstig, at vit nú kunnu greiða frá málsliga samanhanginum og hava eina visualisering, tað er eitt framstig. Vit hava longu ljóð og bendingarmynstrini liggjandi, og alt verður bara lættari. Tú kanst hoyra, hvussu orðið verður sagt, síggja, hvussu orðið verður bent, og nú kanst tú eisini síggja tað visualiserað. Hetta ger, at vit eru inni har, sum undirvísingartilfarið er. Vit hava altíð hugsað tað soleiðis, at tú hevur eina lærubók og eina orðabók afturat. Nú hava vit lagt 1.000 myndir inn og hava ætlanir at leggja 5.000 til 10.000 myndir inn fram til komandi summar.

Tankin hjá Sprotanum er, at vit eisini skulu hava eina myndorðabók seinni. Tá verður møguleiki hjá lærarum at gera spennandi tilfar, við fínastu myndunum, og har fær

brúkarin at vita, hvussu kvørkveggja eitur á øllum hinum málunum. So kann eitt leinki liggja til kvørkveggjuna og siga alt møguligt um henda fuglin. Fyribils hava vit keypt okkum inn í tríggjar stórar myndagrunnar, sum vit kunnu heinta úr. Myndagóðskan er framúr.

**Rúni: Nú er komin ein tiltaksorðabók, sum er knýtt at Sprotanum. Hví?**

**Jonhard:** Tiltaksorðabøkur hevur tú í øllum málum. Vit hava varnast, at glopp hevur verið millum unga og eldra ættarliðið, tá ið vit tosa um fastar orðingar og orðatøk. Yngra ættarliðið kennir ofta ikki merkingarnar. Her kann nýggja orðabókin siga, hvaðan hetta orðið er tikið. Hava vit t.d. eina orðing, sum er tikin úr Bíbliuni, so sær brúkarin samanhangin. So vísir hon eisini fastar orðingar, sum líkjast og hava sama innihald. So koma hugleiðingar um, hví hetta man vera komið í, t.d. tilsipingar og fólkalívsfrøðiligar orsakir.

**Kári: Tit hava yvir 2.000 orð í tiltaksorðabókini. Legst afturat?**

**Jonhard:** Ja, vit eru 12 ritstjórar, sum sita við hesum bókunum. Hjalmar Petersen og Páll Isholm eru ritstjórar á hesi tiltaksorðabókini. Teir fara ivaleyst at leggja meira og meira inn har, sum tíðin líður.

**Rúni: Tað var eitt drúgt tíðarskeið, har lítið hendi á orðabókaøkinum. Hvussu var tað søguliga, tá ið tú hugsar um orðabøkur í Føroyum, um vit t.d. fara til farnu øld?**

**Jonhard:** Tann fyrsta er frá 1928, og tað vóru Christian Matras og Mads Andreas Jacobsen, sum ritstjórnaðu føroysk/donsku orðabókini. Í 1961 kom 2. útgáva við fleiri orðum, og í 1974 kom eykabind, sum Jóhan Hendrik Winther Poulsen ritstjórnaði. Men frá 1928 ganga eini 40 ár, til Jóannes av Skarði kemur við donsk/føroysku orðabókini. Í 1998 kom Móðurmálsorðabókin.

**Rúni: Hóast fáar orðabøkur, hóraði málið undan. Hvør man eiga heiðurin?**

**Jonhard:** Tað er torført at siga. Vit hava ikki havt nógvar akademikarar, sum hava fingist við føroyskt, burtursæð frá teimum monnum og kvinnum, sum stovnaðu Fróðskaparsetur Føroya. Hesir idealistar bygdu á teir málsligu tankarnar, sum stovnararnir av háskúlanum høvdu. Hesi fólk, sum stovnaðu Setrið, hava lagt ótrúliga nógv tilfar eftir seg. Hugsar tú um gerandisdagin, er tað serliga vanligi føroyski bygdaskúlalærararin ella fólkaskúlalærararin, sum hevur hildið lív í málinum og varðveitt tað.